## Irakar fjala seg í Danmark

Síðani Danmark og Irak fyri fýra mánaðum síðani samdust um, at Danmark kann senda irakar heimaftur, hava minst 95 irakar gjørt av at fjala seg fyri at sleppa undan at verða sendir heim. Tað vísa tøl hjá útlendingadeildini hjá løgregluni, skrivar Berlingarin. Ein talsmaður fyri løgregluna sigur, at hóast fleiri royndir hevur løgreglan ikki hitt nakran av teimum 95. Tað kann hugsast, at tey eru farnir av landinum, men tað kann eisini hugsast, at prestar og onnur fjala tey fyri myndugleikunum, sigur talsmaðurin.



## Livni misnøgd

Tzipi Livni, sum er formaður í ísraelska flokkinum Kadima, er sera misnøgd við politikkin hjá Benjamin Netanyahu, forsætisráðharra og stjórn hansara. Í gjár fanst hon hvassliga at avgerðini hjá stjórnini at byggja meiri enn 300 nýggjar íbúðir á Vestara Áarbakka. Tað skrivar blaðið Ha'aretz. Hon var serliga hvassorðað, tá hon umrøddi forsætisráðharran. Tzipi Livni segði, at Netanyahu sigur eitt, men ger nakað annað, og at hjá honum hevur tað størri týdning at møta til myndatøku enn at taka tær neyðugar avgerðir.

# and





*Hetta er úrslitið av jødiskum byggivirksemi á Vestara áarbakka, sum altjóða samfelagið roynir at steðga, tí talan er um hersetta arabiska jørð. Her sæst jødisk niðursetubygd í Hebron*

til meira eftirlæti. Hansara rundferð í arabiska heiminum fyrr í ár varð ein skelkandi roynd at lifra fyri tí muslimska heiminum, metir Motti Isaak, sum ikki vil hoyra talan um samráðingar við “arabiskar terroristar”, sum hann fasthugsin kallar palestinska fólkið ígjøgnum alt kvøldið.

Hann trýr ikki trýr uppá nakran frið við fíggindan. Nei, tað vóru arabararnir, sum lupu á Ísrael í 1948, eftir at ST hevði samtykt at býta økið sundur í ein jødiskan og ein arabiskan stat. Tað vóru arabararnir, sum stovnaðu PLO í 1964 og framdu óteljandi yvirgangsatsóknir ímóti Ísrael, trý ár áðrenn Ísrael “fríaði” Judea og Samaria í seksdagakrígnum í 1967 “við Guds hjálp”, sum hann aftur undirstrikar. Allar royndir at nærkast eini friðaravtalu hava sambært ráðsnara jødiska aktivistinum gjørt Ísrael til eitt ótryggari stað, og tíðin er komin til at ignorera Obama og vesturheimin og seta móðurlandið í fremstu røð.

Og tá Óli Breckmann seinni um kvøldið hevur ein spurning um demokratin á brúnni í Hvítu Húsunum, so eitur hann ikki longur Barack Obama, men Hussein Obama, fyri at undirstrika hansara arabisku røtur. So manglar bara, at vit skifta eftirnavnið Obama út við Osama...

### Land lyftisins

Eg má vera tann einasti persónurin undir 40 ár í hálvtóma Miðlahúsinum og kann staðfesta, at kristin zionisma, hesin margháttligi tokkin til lítla statin við tí bláu dávidsstjørnuni, ikki er ein eiggilig søk millum ung í Føroyum. Flestu gestirnir eru eldri fólk úr føroyska samkomuumhvørvinum. Á fremsta beinki situr sjálv inkarnatiónin av føroyskum stuðli til Ísrael, Svenning av Lofti, og hann svarar hart og játtandi til, meðan Motti hugleiðir um eretz Yisrael, ella Móðir Ísrael. Ikki við himmalvendum eygum og einum nationalreligiøsum rúsi, men við einum hvøssum og álvarsomum eygnabrái.

- Ábraham var søgunnar fyrsti zionistur, tá Gud bað hann fara úr landi sínum og byggja nýtt land í Judea og Samaria. Síðani hevur ein jødiskur minniluti altíð búð í heilagu býunum í økinum. Og eg havi ongantíð verið meiri bjartskygdur enn í dag, nú talið av jødiskum búsetingum í økinum táttar í eina hálva millión, sigur Motti Isaak.

Upprunin til modernaða zionismu verður mangan dagfestur afturi í 1896, tá eysturríkski jøðin Theodor Herzl gav út bókina Der Judenstaat, sum proklameraði visjónina um ein jødiskan heimstað í Palestina. Men fyri at skilja mentalitetin hjá Motti og hansara ideologisku brøðrum og systrum á Vestara áarbakka skulu vit eina longri ferð aftur í tíðina. Aftur til Ábraham, sum í 1. Mósebók kapittul 12 fær guddómlig boð um at fara

> *- Eg havi ongantíð verið meiri bjartskygdur enn í dag, nú talið av jødiskum búsetingum í Judea og Samaria táttar í eina hálva millión*

úr húsi faðirs síns “til landið, ið Eg skal vísa tær”, sum skrivað stendur. Leiðin varð løgd til Kánansland, og nú er landið aftur vorðin ogn hjá útvalda fólkinum, sum ikki vendir hin vangan til, tá fíggindin nærkast.

- Stríðið millum ísraelar og arabarar byrjaði ikki í 1948, tá staturin Ísrael varð stovnaður. Stríðið byrjaði ikki í 1967, tá vit við Guds hjálp fríaðu Judea og Samaria. Stríðið byrjaði, tá fyrsti jødiski innflytarin setti sín fót á lovaða landið. Hygg at Gaza! Vit fóru haðani í 2005, og síðani hava rakettirnar regnað inn yvir Suðurísrael. Um vit taka okkum aftur úr Judea og Samaria, so koma Jerusalem og Tel Aviv eisini í skotlinjuna. Og vit vóna, at núverandi stjórnin ikki verður so býtt og bláoygd at lurta eftir verðini og geva eftir fyri altjóða trýsti, er Motti Isaak avgjørdur.

Hann hevur eitt stórt kort av Miðeystri á vegginum, og við hansara vinstru lið er eitt stórt føroyskt og eitt líka stórt ísraelskt flagg. Við penninum vísir ortodoksi jøðin, hvar sløgini hava staðið síðani 1948, og hvar búsetingarrørslan í løtuni byggir og útbyggir.

Yvirfyri altjóða samfelagnum tekur ísraelska stjórnin frástøðu frá intensa byggivirkseminum. Men tigandi heldur virksemi fram, hóast Ísrael sambært øllum altjóða semjum hevur bundið seg til at steðga vøkstrinum og geva rúm fyri einum komandi palestinskum stati. Motti og hansara andsfelagar eru har av religiøsum orsøkum, men sekulerar ísraelskar stjórnir hava sanniliga sæð strategiska týdningin av búsetingunum og gagnnýtt hesa rørslu. Endamálið er sólarklárt: At leggja so nógv land inn undir seg sum gjørligt og harvið skapa sær eitt sterkt útgangsstøði, um endaleysu friðarsamráðingarnar einaferð skuldu ført til eitt kompromis.

### Hin fyrsti steinurin

Tá maðurin er liðugur at tosa um prosjektið hjá honum og hinum búsetingunum á Vestara áarbakka spyrji eg, hvussu aktuella konfliktin kann loysast. Hann borðreiðir fyrst við einum orðafloymi um anti-ísraelskar journalistar í vesturheiminum og svarar síðani, at alt prátið um eina friðaravtalu og ein palestinskan stat undir liðini á Ísrael, tað vil siga í Gaza og á Vestara áarbakka, er óaktuelt og veruleikafjart. Tað ber ikki til at fáa frið í lag, tá grannin hevur valt kríggj. Tað besta, Ísrael kann gera, er at berjast ímóti yvirgangi og royna at halda tørn yvirfyri útlendskum trýsti.

Tað er altíð áhugavert at fáa størri innlit í hugsunarháttin hjá eini rørslu, sum hevur ein so sentralan leiklut í ísraelskum politikki. Men tað er samstundis leiðiligt at lurta eftir einum manni, sum hevur so syndarliga lítið konstruktivt at siga um aktuellu konfliktina millum ísraelar og palestinar. Fíggindin er ein riðil av terroristum, basta! Ikki ein tann einasta jánkasliga royndin at skilja, verstehen, hvaðani palestinska vreiðin og harðskapurin kemur. Ongin sannkenning av, at ísraelska-arabiska konfliktin er ein drúgvur spiralur av harðskapi, sum gongur báðar vegir, og sum plaserar ábyrgd báðumegin hegnið. Og ein framløga, sum er so kemiskt reinsað fyri reflektiónum um, hvussu partarnir kunnu koma víðari, er ein lítið verd framløga.

Hvør kastaði fyrsta steinin? Fyri ein jøða vil søgan altíð vera, at hansara fólk varð rikið í útlegd fyri 2000 árum síðani, sum síðani hevur verið heimleyst og forfylgt, og hvørs líðingar kulmineraðu við jødatýningini í Nazitýsklandi. Ísrael er søgunnar seinasta flóttalega, og nú ræður um at berjast fyri sínum rætti. Fyri ein palestina byrjaði útlegdin og líðingin í 1948, tá umleið 800.000 palestinar vórðu ryktir upp við rót og tveittir út í eina tilveru sum heimleys flóttafólk. Ein støða, sum versnaði við hersetingini í 1967. Sum hevur ført til eina regulera avbyrging av palestinsku samfeløgunum í Gaza og á Vestara áarbakka. Og sum hevur kostað fleiri túsund palestinsk mannalív í samanbrestum við ísraelska yvirvaldið.

Tvær ymiskar søgur um, hvør kastaði fyrsta steinin. Tvær ymiskar raðfylgjur í strembanini eftir at kortleggja, hvør førir eitt sjálvboðið og aggressivt kríggj, og hvør førir eitt neyðugt og fyribyrgjandi kríggj. Tvær ymiskar fatanir av, hvør partur agerar, og hvør partur reagerar.

Í gjárkvøldið í Miðlahúsinum hoyrdu vit so tað fyrru søguna. Søguna um jøðan, sum rættvíst verjir seg fyri arabiskum ágangi. Men søgan er altíð hálv, tá søgan hjá mótpartinum ikki verður fortald.

### FAKTA

**um jødiskar búsetingar:**
Síðani Ísrael hersetti Vestara áarbakka frá Jordan í 1967, hevur talið av jødiskum búsetingum í økinum verið støðugt vaksandi. Sambært fólkateljing í 2007 vóru 484.000 jødiskir búsetingar á Vestara áarbakka. Sambært ST-løggávu og viðtøkum í bæði amerikanska kongressini og ES-parlamentinum er vøksturin av jødiskum búsetingum ólógligur og brýtur altjóða semjur, tí økið er ætlað einum komandi palestinskum stati. Í 2005 tvangsflutti ísraelska stjórnin sínar 10.000 jødisku búsetingar í Gaza. Nýggja amerikanska stjórnin hevur herðað trýstið á ísraelsku stjórnina um at steðga við byggivirkseminum á Vestara áarbakka.